HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Mannagongd viðv. veterinerum váttanum til Russlands

Tórshavn, hin 05. august 2009
Málnr.: 404-200900249-22

**Viðvíkjandi: Dagførd mannagongd fyri undirskriving av heilsuváttanum til Russlands**

Fyrsta mannagongdin var dagfest 15. juni 2009, okkara mál 200900249-18. Hendan dagførda mannagongdin hevur fleiri upplýsingar við, soleiðis at tingini eru enn greiðari.

**Alment.**

Niðanfyri er mannagongdin sett upp, sum skal haldast, fyri at kunna fáa veterinerváttan fyri fisk, ið verður útfluttur til Russland.

Mannagongdin er sett upp soleiðis at øll krøvini í veterinerváttanini kunnu verða gingin á møti, men eisini soleiðis at avtalan ið er við russar, kann verða hildin sum væntað. Avtalan (memorandum of understanding) ið er við russar, sæst á www.hfs.fo, undir lógir og kunngerðir og so Russland.

Størsta avbjóðingin við hesari mannagongdini er fyri fesku vørurnar ið fara til Russland. Fyri frystu vørurnar hevur man betri tíð at arbeiða við viðurskiftunum.

**Mannagongd.**

Heilsuváttanin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi kl. 12 tann dagin (gerandisdagar), man ætlar at útflutningurin skal fara framm. Váttanin skal sendast sum pdf skjal til vattan@hfs.fo.

Tryggjast skal at tað er tann rætta skabilónin ið verður nýtt, sí www.hfs.fo, undir heilsuváttanir, t.e. russaraváttanin við eyðmerkingini 200800475-5.

Upplýsingar viðv. føroyskum løggildaðum virki, skulu verða einsljóðandi við góðkenda listan til Russland.

Upplýsingar viðv. russiskum innflytara, skulu verða einsljóðandi við teir innflytarar, ið virkið hevur upplýst fyri Heilsufrøðiligu starvstovuni og sum vit hava latið víðari til Rosselkhoznadzor (hereftir RKZ). Tað mugu bert skrivast russiskir innflytarar á váttanina, sum teir ið virkið hevur upplýst fyri Heilsufrøðiligu starvsstovuni og sum vit so aftur hava upplýst fyri RKZ.

Er talan frostvørur, ið hava ligið á frostgoymslu, skal frostgoymslan upplýsast á heilsuváttanini, hetta eisini hóast frostgoymslan kanska ikki hevur upplýst russiska innflytaran hjá løggildaða virkinum fyri HS. Við næstu dagføring av listunum, koma vit at venda aftur til hetta við russiskum kundum hjá frostgoymslum.

Viðv. segling, so verður hetta kravið, smbrt. tí ið embætisdjóralækni undirskrivar:

1. **Bingjan fer beinleiðis til russiska markið, frá føroyskum landøki:**
   Bingjan verður plomba við segli frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Seglið hevur eitt eintýðugt nummar, og hetta nummarið skal framganga av heilsuváttanini.

2. **Bingjan fer til russiska markið, frá føroysum landøki, men verður umlasta aðrastaðni, t.d. í Danmark:**
   Í hesum føri, skal hvør einstakur plattur verða seglaður við HS segli. Kravið er at platturin er væl vikladur við plastikki, soleiðis at man ikki kann taka nakra eskju út úr plasttikkinum, uttan so at

plastikkið verður skrætt. Seglnumrini fyri hvønn platt, skal framganga av heilsuváttanini (talan kann gott verða um upp til 18 plattar per bingju og harvið 18 seglnummur ið skulu framganga av váttan).

3. **Frostbátur, fer úr føroyskari havn, beinleiðis til russiska havn (t.d. við pelagiskari vøru)**
   Í hesum føri, skulu lastalúkur og onnur atgongd til vøruna, verða seglað við HS seglið. Seglnumrini skulu framganga av heisluváttanini. Í útgangsstøðinum skal báturin sýnast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni, áðrenn byrja verður at koyra vøru umborð. Hetta fyri at tryggja, at ikki onnur vøra liggur í bátinum.

4. **Fiskavøra løgd upp í øðrum londum.**
   Fyri tey føroysku verksmiðjuskip ið eru á Russlandslistanum, er kravið, at vøran skal verða landa í Føroyum, fyri at fáa veterinerváttan frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni fyri at vøran skal kunna koma inn til Russland. Øll viðurskiftini í avtaluni eru galdandi fyri Føroyar og føroysk virki, herundir eisini føroyskar frostgoymslur og er tað hetta í embætisdjóralækni váttar við sínari undirskrift.

Viðv. forsegling av hvørjari einstakari eskju ("official labelling", pkt. 4.10 í váttanini), velja vit her at byrja við tulka hetta soleiðis, at tá øll bingjan, ella hvør einstakur plattur ella lastin á frostbátinum er plomba við segli, so er hetta at meta sum verðandi í lagi.

Gerast skal staðiliga vart við, at hetta er ein fyribils loysn og verður heitt á øll virkini ið eru á Russlandslistanum um skjótast gjørligt at kannað møguleikan fyri "official labelling" av hvørjari einstakari eskju og at kunna seta hesa loysnina í verk, við stuttari freist.

Í byrjanini verður tað gjørt 100 % eftirlit. Hetta merkir, at er tað ein bingja ið skal plombast, so skal bingjan frammvið á Falkavegi um ikki onnur avtala er gjørd, soleiðis at vit kunnu staðfesta tingini. Bingjan verður plomba á Falkavegi við HS plombu, meðan HS fólk er til staðar.

Eru tað plattar við verða plombaðir, skulu HS fólk plomba plattarnar áðrenn hesir verða koyrdir inn í bingju.

Er talan um frostskip, skal HS fólk hava sýnað skipið og vøru, og plomba lastalúkur o.a., áðrenn heilsuváttan verður undirskrivað (skipið skal eisini sýnast áðrenn byrjað verður at lasta skipið, sí omanfyri).

Feltið viðv. "Administrative-territorial unit", skal standa "Faroe Island". Í mun til veterineravtaluna vit hava við ES, er føroyska landøkið býtt upp í ymisk øki, sum eru tilrættislagt soleiðis, at verður útbrot av djórasjúku á landi, so veit man frammanundan hvussu niðurberjingarøkini eru ásett. Hetta er tað ið svarar til "Administrative-territorial unit".

Sama ger seg galdandi fyri sjúkuútbrot á sjónum, t.d. innan alivinnuna. Eisini har eru økini ásett. Men, í mun til russisku heilsuváttanina, hava vit valt, at tað er í lagi at skriva "Faroe Island". Skuldi okkurt óvæntað uppstaði, so fara vit at klára at afturkallað vøru, útfrá upplýsingunum á heilsuváttanini.

Viðv. listeria, pkt. 4.6, so er tað ábyrgdin hjá virkinum. Løggildingarkravið er 4 vørukanningar um árið. Er tað soleiðis at virkið hevur trupulleikar við listeriu, skal virkið steðga við útflutningi til Russland, og kann útflutningurin fyrst byrja aftur, tá virkið yvirfyri HS skjalprógvar at verða frítt fyri listeria.

Haraftrat skulu kanningarúrslit smbrt. russiskum krøvum fyriliggja áðrenn veterinerváttanir vera undirskrivaðar av embætisdjóralækna.

Annars skal gerast vart við at tað eru løggildaðu virkini ið hava skyldu at seta russisku krøvini í verk við t.d. at skoða um tey liva upp til russisku reglnar (sí www.hfs.fo, lógir og kunngerðir og so Russland).

Tær uppfylgingar ið hava verið gjørdar av Heilsufrøðiligu starvsstovuni eru í mun til tær staðfestingar sum russar gjørdu ta teir vitjaðu okkum í maj 2008. Í.s.v. vanliga eftirlitið á virkjunum, koma vit eisini at kannað hetta í mun til russisku krøvini. Metur HS viðurskiftini ikki at verða nøktandi, kann virkið fáa boð um ikki at útflyta til Russland.

Avtalan (Memorandum of understanding) við russar var undirskrivað 15 januar 2009. Okkara tulking er, at vøra ið er framleidd áðrenn hendan dagin, ikki kann fara til Russland og tí verður veterinervâttan ikki gjørd fyri hesa vøru.

**Eftirskriv.**
Hendan mannagongdin er gjørt eftir fundin ið var við vinnuna tórsdagin 11 juni 2009 og eftir at vit síðan tá hava gjørt fleiri kanningar viðv. útflutningi til Russland.
Sum tað var sagt á fundinum, so skulu vit fáa tingini at glíða hesa fyrstu tíðina og samlað okkum royndir, bæði í mun til at arbeiða við váttanunum men so sanniliga eisini hvørjar afturmeldingar koma við russiska markið.

Haraftrat ætla vit okkum eisini at hava eitt aktivt og konstruktivt samskifti við RKZ, akkurát sum pkt. 10 í memorandum of understanding leggur upp til, soleiðis at tær avbjóðingar vit møta, hava felags uppfatan bæði í Russlandi og í Føroyum. Tað verið seg bæði í mun til Memorandum of understanding, heilsuváttanina, møguliga komandi eftirlitsvitjan av russum o.a.

Dagføringin av hesum skrivinum er ein roynd at gera tingini nakað greiðari og koma við fleiri upplýsingum, ið ikki vóru við upprunaliga skrivinum.

**Fyrispurningar.**
Fyrispurningar viðv. heilsuváttanum til Russland kunnu stílast til Elspu Petersen ella Ingibjørg Egholm embætisdjóralæknar, ið verða teir embætisdjóralæknar ið at byrja við koma at undirsrkivað veterinerváttaninar.